## StatoilHydro keypt Goliat

Norska oljufelagið DNO hevur selt sín part av oljuleiðini Goliat. Talan er um 15 prosent av leiðini. Keypari er StatoilHydro, sum hevur goldið næstan 1,3 milliard norskar krónur fyri partin hjá DNO, skrivar NTB. Erik Haugane, forstjóri í DNO, sigur, at sølan ger tað møguligt hjá felagnum at fullføra aðrar verkætlanir hetta til 2012. DNO, sum bleiv skipað, tá feløgini Petra og DNO blivu løgd saman, hevur søkt um nýggj leitingarloyvi í Barentshavinum. Felagið hevur í dag umleið 120 starvsfólk.

## Magasin og Illum kanska bretsk

Okkurt bendir á, at donsku stórhandlarnir Magasin og Billum enda á bretskum hondum, og at mótahúsið Day Birger et Mikkelsen fær somu lagnu. Tað væntar Børsen í hvussu er. Blaðið vísir á, at bretska handilsmaðurin Sir Philip Green hevur verið í Íslandi nú um dagarnar og tingast um at yvirtaka skuldina, sum Baugur-samtakið skyldar trimum størstu íslendsku bankunum. Jón Asgeir Johannessson, sum var stóreigari og nevndarformaður í Baugur, keypti seg inn í Magasin og Illum fyri fýra árum síðani, men fíggjarkreppan fer væntandi at noyða íslendingar at selja tað, sum teir eiga uttanlands, skrivar Børsen.

# Norska frálandavinnan óttast fíggjarkreppuna

**Í Noregi verður stúrt fyri, at altjóiða fíggjarkreppan skal raka norska skipasmiðjuídnaðin og reiðaríini í frálandavinnuni**



*ltjóða fíggjarkreppan kann eisini raka skipasmíð og frálandavinnu (Mynd: Sunnmørsposten)*

SKIPASMÍÐ
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

- Vit hava grund til at stúra, men enn hava vit ikki sæð nakað dømi um, at byggisáttmálar eru útsettir ella ógildaðir orsakað av vantandi fígging, sigur stjórin í marknaðarfyritøkuni Norske Skipsverft, Birger Skår, við Sunnmørsposten.

Hann leggur afturat, at enn hava skipasmiðjurnar heldur ikki fingið boð um, at nøkur byggiætlan verður slept orsakað av vantandi fíggingarmøguleikum. Hann ásannar hinvegin, at tær broyttu umstøðurnar fara uttan iva at síggjast aftur í bíleggingarbókunum hjá skipasmiðjunum, og tað er nóg álvarssamt, sigur hann.

Í løtuni hava norsku skipasmiðjurnar bíleggingar fyri meiri enn 60 milliardir norskar krónur, og meiri enn 80 prosent av hesum eru innan frálandavinnuna, sigur Birger Skår við Sunnmørsposten.

Tann vanliga mannagongdin við skipasmíði er, at skipasmiðjurnar hava eitt byggilán, reiðaríið rindar eitt ávíst forskot, og tann endaliga uppgerðin verður so avroknað, tá skipið verður latið eigaranum. Men fíggjarkreppan kann gera, at hetta mynstrið verður broytt, og at skipasmiðjurnar nú fara at treyta sær, at reiðaríið hevur útvegað sær taneyðugu langtíðarfíggingina, áðrenn sjálv byggingin fer í gongd.

Sunnmørsposten skrivar, at tað er sjáldsamt, at eitt reiðaríið var noktandi svar, tá tað ætlar at byggja sær nýtt skip, tí vanliga verður ein ella onnur loysn funnin, so verkætlanin kann fullførast.

# Íslendski fiskiveiðipolitikkurin fær rós frá FAO

**Íslendski fiskiveiðipolitikkurin er ábyrgdarfullur, men kann gerast uppaftur betur, sigur FAO**

FISKIVEIÐI
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

FAO, sum er matvøru- og landbúnaðarstovnurin hjá ST, nevnir Ísland, Ný Sæland og partvíst eisini Avstralia og USA sum dømi um lond, ið reka ein ábyrgdarfullan fiskiveiðipolitikk. Í einari nýggjari frágreiðing, sum júst er almannakunngjørd, fáa tey fýra londini rós frá FAO, sum tó ger vart við, at enn er ikki komið á mál.

Í frágreiðingini hjá FAO verður sagt, at málið við at endurskoða og umskipa fiskiveiðipolitikkin er at menna fiskastovnarnar og laga tað so, at vinnan fær sum mest burtur úr tilfeinginum. Skal málið røkkast, er neyðugt at leggja helmingin av tí flota, sum nú er í vinnu, og tað kann gerast, uttan at minni kemur upp á land.

FAO vísir í hesum viðfangi á, at árliga verða fiskað umleið 80 milliónir tons kring heimin, og at nøgdin hevur verið at kalla tann sama tey seinastu tíggju árini.

Saman við Heimsbankanum hevur FAO roknað seg fram til, at árliga hava heimsins fiskiflotar umleið 50 milliardir dollarar í halli.



*slendingar fáa rós frá FAO fyri tann rikna fiskiveiðipolitikkin (Mynd: Morgunblaðið)*